## DAGSINS MEINING

# Hvørjar avtalur vóru brotnar harra løgmaður?

Øll kunnu ivaleyst taka undir við løgmanni, tá hann mælir til semju og sakligheit í nýggjársrøðuni. Eitt sakligt orðaskifti byggir á rættar upplýsingar í góðari tíð og eisini uppá evnini at taka í egnan barm, um onkur ósemja skuldi stungið seg upp. Løgmaður hevur í sínari løgmansrøðu - og her kenna vit framferðina hjá varaløgmanni aftur - víst ein óvanligan mangul uppá sjálvkritikk í fullveldismálinum. Alt var eftir øllum at døma fullkomið frá føroyskari síðu, og danskarar høvdu allan feilin av, at man ongan veg er komin við fullveldisleistinum hjá Tjóðveldinum.

Væl vita vit, at Nyrup stjórnin langt frá altíð er tann lagaligasta at fáast við, men at teir ferð eftir ferð hava brotið avtalur og ikki fylgja vanligum samráðingarreglum, eru ikki sakligir póstandir. Um løgmaður sipar til avtaluna um, at man skal miða móti einum sjálvberandi búskapi í Føroyum, so er tað undrunarvert og ikki sørt ódámligt, at eingin embætismaður ella serfrøðingur annars tekur sær stundir at greiða løgmanni frá, hvat sjálvberandi merkir. Er tað veruliga so, at eingin torir at tala ímóti? Portugal hevur ein sjálvberandi búskap. Livistøðið er gamaní lægri enn í Føroyum við ella uttan blokk, men eingin skal siga, at hann ikki er sjálvberandi. Um føroyski búskapurin knappliga hevur 1,4 milliard meira í útreiðslum enn inntøkum, so er einki annað at gera enn at lækka útreiðslurnar tilsvarandi, men so er føroyski búskapurin eisini sjálvberandi, ella hvussu? Sjálvberandi merkir ikki neyðvendigvís sjálvberandi við sama livistøði. Hvørjar avtalur eru brotnar harra løgmaður? Eru slíkir pástandir grundarlagið undir sakliga orðaskiftinum?

Hvørji rættindi missa vit við ikki at ganga leið Tjóðveldisfloksins? Um so er, at samgongan hevur spælt okkum av við nøkur rættindi í sínari milt sagt løgnu framferð, hvat ikki er trúligt, so er fullveldismálið óalmindiliga illa avstað farið.

Vit vóna at ynski løgmans um sakligt og siðiligt orðaskift verður veruleiki. Ein fortreyt er tó, at leysir pástandir verða manaðir í jørðina eins og sjálvkritikkur má til, tí at eingin ætlan er fullkomin, og sera sjáldan liggur feilurin í einari ósemju bara øðru megin borðið. Vit sleppa at loysa við 4 ára skiftistíð, men landsstýrið torir ikki at taka av — nú er umráðandi, at samgongan viðurkennir niðurlagið og meldar klárt út í góðari tíð, helst í morgin, hvat fólkaatkvøðan kann innhalda, so øll fáa sett seg ordiliga inn í tingini.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Kvøðari høgan starvsdag



Tað sigur ikki so lítið um stabilitetin á einum arbeiðsplássi, at eitt starvsfólk hevur 45 ára starvsdag. Týsdagin 2. januar í ár kundi Sigmundur í Hoyvík halda 45 ára starvsdag hjá P/F Poul Hansen í Havn. Í samfull 45 ár hevur hann talt saman og hildið skil á tølunum hjá hesi kendu fyritøku. Hann hevur starvast sum bókhaldari í hesi fyritøku, sum hevur leverað so at siga allar nýtsluvørur til so at siga hvønn einasta føroying og mong ár.

Men Sigmundur er eisini kendur sum kvøðari, tann góði vertskapsmaðurin, hvørs rødd hevur lagt lunnar undir mangt gott brúdleypið, tá hann hevur skipað brúðarvísu bæði á føroyskum og donskum.

Og Sigmundur riggar væl í einum dansiringi. Prúður er hann og røddin er góð. Og hann livir seg rættuliga inni í frásagnirnar í kvæðunum. Hann hevur borið arvin víðari, sum okkara forfedrar tjúklaðu um í vanligari dansitíð og bóru við sær í øllum verki. Og eftirkomarar hansara bera eisini arvin víðari. Tillukku við degnum.



*Bergur Hansen, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

# Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**

---

†

Kæra kona, mamma og omma okkara

**MALFRID MIKKELSEN**
**fødd Madsen, ættað av Sandi, búsitandi í Havn**

andaðist í heiminum týsmorgunin 2. januar,
76 ára gomul.
Kistan fer úr heiminum hóskvøldið kl. 18.00
í Havnar Kirkju.
Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Th. Juul og Meiken**

---

†

Kunngjørt verður, at okkara elskaða kona, mamma, omma, langomma, systir og vermamma

**Eiðvør Hansen**
Skopun

andaðist 31. desember.

Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju í dag kl. 13.00.

**Tróndur Juul, Bergur, Jonna, Eli, Basa**
**og Anna Maria v/familjum**

---

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Agip og Føroya Kolvetni í nýggj høli

**Fyrst í nýggja árinum fluttu tvey av oljufeløgunum, sum hava leitingarloyvi, í nýggj høli í høvuðsstaðnum. Tað er føroyska deildin av italska oljufelagnum Agip og síðani føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni.**

OLJUFELØG OG BÚSTAÐUR
*Jan Müller*



*Ingi Højgaard, sum kemur at standa á odda fyri nýggju skrivstovuni hjá Agip í Havn.*

*Mynd Jens K. Vang*

Bæði feløgini flyta inn í hvør sína hædd í bygninginum á Bryggjubakka, har Trygd helt til fyrr. Nú í eina tíð hava eisini fleiri onnur útlendsk oljufeløg hildið til her. Teirra millum Saga, Norsk Hydro og Texaco. Hesi eru ikki í Føroyum longur.

Agip er flutt inn í niðastu hædd í bygninginum, sum Anfinn Hansen, advokatur eigur. Tað var her Texaco húsaðist áður. Ikki verður tað tann stóra manningin, sum fer at verða á skrivstovuni alt fyri eitt. Settur er skrivari/samskipari á deildina fullan dag. Tað er Mildrid Jacobsen, sum hevur starvast sum journalistur í Útvarpinum. Leiðari á deildini verður Ingi Højgaard, advokatur, sum tó bert fer at vera á skrivstovuni nakrar tímar um dagin. Hann fer framhaldandi at hava sítt arbeiði á Advokatfelagnum Yviri við Strond. Agip hevur annars søkt eftir fólki til eitt nýtt starv sum oljuvinnuráðgevi. Tað verður sett í næstum.

Agip er ikki í somu støðu sum hini feløgini, ið hava fingið leitiloyvi. Felagið ætlar sær nevniliga ikki at bora fyrr enn í 2002, og tað gevur sostatt felagnum betri rásarúm.

Í hæddini uppi yvir hjá Agip heldur Føroya Kolvetni til. Felagið er flutt úr bygninginum hjá Realinum í Niels Finsensgøtu. At Agip og Føroya Kolvetni eru í sama bygningi við felags inngongd er neyvan heldur av tilvild. Tí bæði feløgini eru í sama samtaki, sum fekk leitiloyvi herfyri. Tað er tí greitt, at tey koma at hava tætt samstarv.

# Sigrun sett sum barnapsykologur

**Sigrun Samuelsen tók 1. januar við starvinum sum barnapsykologur hjá barnaverndarnevndini í Tórshavnar kommunu**

*Turið Kjølbro*



*Sigrun Samuelsen fær nóg mikið at gera sum psykologur hjá barnaverndarnevndini í Tórshavnar kommunu. Málini vaksa bæði í vavi og nøgd.*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*

Arbeiðssetningurin hjá barnapsykologinum í Tórshavnar kommunu er tvíbýttur. Umframt at arbeiða við málunum, sum koma til barnaverndina, gera kanningar í málunum og avgreiða tey, skal hon vegleiða og ráðgeva starvsfólki og málsviðgerðarum á sosialu deild á býráðnum.

– Starvið minnir um tað eg havi arbeitt við. Á Bornholm arbeiddi eg við atferðatruplum børnum út frá fólkaskúlalógini. Í hesum starvinum verður tað út frá sosiallóggávuni, sigur Sigrun Samuelsen.

Sigrun var útbúgvin psykologur í 1986. Síðani starvaðist hon í trý ár í Útvarpi Føroya og í 7 ár á Føroya Læraraskúka, har hon undirvísti pedagogum og lærarum í sálarfrøði. Samstundis var hon í 2-3 ár psykologiskur konsulentur á Almannastovuni. Í 1996 fór Sigrun til Bornholm at arbeiða sum kliniskur psykologur á Sernámsfrøðiligu Ráðgevingini og teir seinastu 14 mánaðirnar hevur hon verið leiðari á stovninum.

### Nógv mál

Nógv mál koma á borðið í barnaverndini hjá Tórshavnar býráð.

– Málini vaksa bæði í vavi og nøgd. Í dag kemur barnaverndin skjótari inn í einstøku málini enn áður, tí tey verða skjótari fráboðað, og tey verða eisini skjótari avgreidd. Grundin er, at fólk eru betur upplýst og tilvitað, bæði skúlar, barnagarðar og foreldur. Tað er heldur ikki óvanligt, at familjur biða um hjálp og ofta skal bert vegleiðing til, so gongur alt betur, sigur Elin H. Joensen, forkvinna í barnaverndini.

Barnaverndin í Tórshavnar kommu hevur ikki áður havt psykolog burturav í starvi. Mannagongdin higartil hevur verið, at nevndin hevur keypt sær serkøna hjálp fyri hvørt mál sær.

# Jarnbardur í myndum

**Áhugaverd myndafrásøgn um Quinnurnar á Jarnbardi givin út í bók. Myndamaðurin, Gunnar F. Mikkelsen hevur fylgt kvinnunum á seksmannafarinum Janrbardi eitt ár frá tí venjingin byrjaðu og til seinasta róðurin.**

Kappróður er áhugaverdur, ikki bara fyri tey sum rógva, men sanniliga eisini fyri áskoðaran. Kappróður er eisini áhugaverdur fyri tey, sum eru limir í einum kappróðrarfelag.

Fyri tey flestu er kappróður bara løtan frá at Jógvan Arge sigur: »So skjeyt hann!« og til bátarnir koma á mál. Men fyri kappróðrarfólkið fyri manningarnar er sjálvur róðurin á stevnunum bara prikkurin yvir i´ið.

Frammanfyri fyrsta róðurin á Norðoyarstevnu liggur tungt stríð og ikki altíð so hugaligt heldur. Frá flaggdegnum 25. apríl og teir næstu tríggjar mánaðarnar fram til Ólavsøku meldar ungdómurin seg næstan úr samfelagnum og nýtir so at siga hvørja einastu fríløtu til okkurt, sum hevur við kappróður at gera. Antin av venja í bátinum ella á landi, ella at hvíla seg til næstu venjing ella róður. Tað dugir ikki at liva villa lívið hvørt vikuskifti ella sita upp langt út á næturnar framman fyri telduskerminum og chatta.

Teksturin er ongin í bókini, hann er heldur ikki neyðugur. Myndirnar eru ikki vakrar, tær eru ráðar, erligar og sigandi og tað er júst tað sum reportasjumyndir eiga at vera.. Gunnar F. Mikkelsen er reportasjufotografur, útbúgvin í Danmark.

Jarnbardur hevur ikki tapt ein einasta róður seinastu 13 róðrarnar. Spurningurin er um tú fær eina sanna mynd av kappróðri bara við at lýsa vinnaran. Okey, tú fær eina sanna mynd av vinnaranum. Men kappróður er eisini so mangt annað enn sigrar. Tað er eisini vónbrot omaná vónbrot og ein lítil partur av einum sekundi kann venda gleði til sorg. Í kappróðri ganga manningarnar 100 prosent upp í róðurin og tá tær geva alt tær eiga fyri at vinna, og tað ikki gongur eftir vild, so er ikki so nógv vekt aftanfyri orðini: »Hetta er bara ítróttur og vit eru bara við fyri at lúttaka.« Og enn minni vekt er aftanfyri orðini at vera ein góður tapari. Og ikki um at tala, tá hendan danska máliskan verður nýtt: »Tab og vind med samme sind«.

Myndabókin um Jarnbard er ikki tann vánaligasta sum kom út undan jólum og so langt burtur frá.

